# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Innballingin samtykt

Innballingin – karmurin, um ólavsøkupakkan er endaliga samtykt á Løgtingi og úrslitið gjørdist nakað øðrvísi, enn landsstýrið hevði ætlað.

Upprunuppskotið hjá landsstýrinum varð ikki samtykt, men eitt broytingaruppskot hjá meirilutanum í fíggjarnevndini. Broytingaruppskotið, sum samgonguumboðini í fíggjarnevndini løgdu fyri Løgtingið, sigur, at Løgtingið tekur undir við, at útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2010 verður 4.643 mió. krónur, men skoytir uppí, at av upphæddini er rakstrarútreiðslukarmurin 4.326 mió. krónur, og løguútreiðslukarmurin 317 mió. krónur.

Hóast meirilutin skrivar, at Løgtingið tekur undir við teimum virkisskapandi tiltøkunum, sum eru fráboðað í ólavsøkupakkanum, so er ikki givið, at pakkin, sum einferð kemur, innihaldsliga verður, sum landsstýrið á ólavsøku boðaði frá. Meirilutin nevnir jú bert tey virkisskapandi tiltøkini, og sum kunnugt er stór andstøða ímóti pørtum av pakkanum.

Støðan er helst tann, at tann ekspansivi parturin av pakkanum innihaldsliga fer at fáa undirtøku, meðan tann táttandi parturin fer at elva til sterka mótstøðu á tingi. Orsøkin til mótstøðuna er skeiva javnvágin - bert tey veikastu skulu spenna beltini inn. Tey, sum frammanundan hava ríviligt, hátinntøkubólkarnir, ja, tey sleppa við bert at skula taka eitt ella tvey rep í seglini.  Tað er óhugsandi, at farið verður pengum hjá peningastovnunum, tað skal tann borgarligi meirilutin á løgtingi nokk síggja til. Hesir partar av pakkanum er sostatt bert tað sukrið, ið skal fáa tann beiska partin av pakkanum at glíða lættari niður hjá Pallaba og Marsonnu.

Hesin parturin, sum hevur til endamáls at spara, at vinna nøkur oyru til landskassan og at tátta í nýtsluna hjá teimum vilt forbrúkandi fólkapensjonistunum er sum øllum kunnugt illa dámdur og ein av samgonguflokkunum á tingi hevur boðað frá, at hann ikki tekur undir við, at pensjonistarnir verð knokkroyttir. Hetta er væl skiljandi. Tey tiltøk, ið longu eru fram, m.a. lækkingin av heilivágstilskotinum, er so illa dámd, at hon longu hevur kostað Javnaðarflokkinum. Verður steinur lagdur oman á byrðu við ætlaðu mótrokningunum í veitingunum til fólka- og fyritíðarpensionistar, kann Javnaðarflokkurin longu nú bíleggja sær pláss millum smáflokkarnar á tingi. Eitt slíkt eksperiment tolir hann ikki, so kunnu tinglimir floksins tosa um framtíðar pensjónskipanir, sum teir vilja. Tað er her og nú tað svíðar til pensjonsitarnar og at halda fast við hesar partar av pakkanum er politiskt sjálvmorð. Tað er nakað, sum minnir um panikk í Javnaðarflokkinum á tingi, og prógvið um hetta er, at formaðurin á tingi nú er farin at skylda upp á embætismenninar og vil hava almenningin at halda, at alt hetta aldri hevur verið ætlan floksins. Hetta reisir nógvar spurningar m.a. hendan: hvat er tað fyri politiskt handverk, sum letur eitt embætismannauppskot fara fyri løgtingið uttan politiska viðgerð? Her eru fleiri syndarar enn floksformaðurin, sum saman við embætismonnunum hevur víðgyrt seg úti í glasborgini á Argjum, har teir halda vakt bæði nátt dag skimandi eftir næstu torpedo frá tingbólkinum.

**Sosialurin**

## Pensjónsnýskipaninin – neyðug?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



**Fá geva pensjónsviðurskiftunum gætur, fyrr enn pensjónsaldurin veruliga nærkast. Tá kann vera tungt at spara upp, um ikki ein skipan er, sum tryggjar øllum, at spart verður upp øll arbeiðsárini**

**Ávegis leeeingi**
Fólk gerast ótrygg, tá talan í longri tíð er um at gera broytingar og ógreitt er, hvussu tað kemur at ávirka hin einstaka.

Skilji væl, at pensjónistarnir í dag hugsa: Hvussu fer alt tosið um eldraøkið at ávirka meg og míni seinnu ár her á fold? Fái eg ikki ráð til tugguna? Varðveiti eg tak yvir høvdið?

Sjálvmótsigandi útsagnir úr eysturi og vesturi gera helst ótryggleikan størri og harma almikið.

Tá ein lesur nýskipanaruppskotið, er nógv ið ‘gevur meining’, meðan annað tykist ivasamt.

**Alternativið**
Heldur verandi pensjónsskipan áfram óbroytt og vit ikki gera broytingar á eldraøkinum verður neyðugt við einum skattaprosenti sum er 60 %  ella einum halli sum er 1,3 milliard. Hóast tey flestu rinda skatt við gleði – um skattakrónurnar vera umsitnar væl – er neyvan nakar, sum heldur tað vera í lagi at rinda 60 % í skatti. Eitt so høgt skattaprosent hevði skapt enn størri fráflyting.

**Øll spara upp**
Uppskotið snýr seg millum annað um, at spart  verður upp av øllum inntøkum – eisini ALSútgjaldi, útgjald frá Almannastovuni, barsilsútgjald. Harumframt eru ætlanir um at bruttofisera pensjónina – tað ljóðar eisini væl. Tí tá gerst sjónligari, hvat ein pensjonistur hevur at liva fyri sammett við onnur.

**Tjóðveldi gleðir seg at viðgera pensjónsnýskipanina**
Tjóðveldi viðgerð uppskotið við stórum áhuga, og vit halda nógv skilagott vera í uppskotinum. Vit halda, at alt ov stórur munur er á pensjónsskipanunum í dag.

**Pensjónsaldurin hækkast?**
Fleiri mótmæla, at pensjónsaldurin hækkar. Sambært uppskotinum hækkar livialdurin enn meir, tískil verða komandi pensjonistar ikki ‘snýttir’ fyri pensjónsárini kortini. Sambært útrokningunum í uppskotinum fáa fólk fleiri ár sum pensjónistar enn tey hava í dag kortini.

Hetta er lutvís rætt – ávísir bólkar eiga bæði lív og góða heilsu fleiri ár eftir verandi pensjónsaldur, men ikki øll. Hjá mongum – serliga ófaklærdum bilar heilsan langt áðrenn ta tíð. Tí er ein skipan neyðug sum eisini hjálpir teimum.

**Eldast ymiskt**
Tað ilskar meg, at samgongan ikki – samstundis - sum uppskotið kemur í tingið, kemur við neyðugum fylgilógum á almannaøkinum hesum fólkum at frama.

Tað er at fegnast um, at mong eiga lív og heilsu at arbeiða – eisini tá tey gerast 67.

Men, alneyðugt er at tey, sum eru niðurslitin, langt áðrenn verandi pensjónsaldur verða umrødd, viðurkend og eru við í heildarætlanini. Tey, sum vegna hart fysiskt ella sálarligt arbeiði eru niðurslitin ella útbrend, áðrenn tey eru 67. Endurbúgving er tíverri ikki í øllum førum ein møguleiki. Og átøk í mun til teirra við skerdum førleika er heldur ikki gerandiskostur.

**Fyritíðarpensjón loysnin?**
Hesi kunnu bara fáa eina fyritíðarpensjón, sigur onkur. Sum er, er viðgerðartíðin í samband við fyritíðarpensjón mangan 1 – 2 ár! Eg klandri ikki starvsfólkini fyri tað – veit, at orsøkin er ov fáar ressursir og kanska ein ósmidlig skipan. Ein smidlig skipan og hóskandi arbeiðsmegi eru tí altavgerandi, um pensjónsnýskipanin skal eydnast væl. Sakni tann partin í kjakinum.

**Ússaligt at klandra embætisfólkini**
Orka er brúkt til pensjónsnýskipanina í fleiri ár. Nú uppskotið sær dagsins ljós og øll ikki taka undir við uppskotinum, fáa embætisfólkini skuldina! Spell at andstøða og samgonga keglast – láturligt at samgongulimirnir vaska hendurnar um kapp í hesum máli, men at leggja eftir embætisfólkunum er beinleiðis ómansligt og ússaligt!

**Politiska arbeiðið byrjar nú**
Í tinginum fingu vit at vita, at politiska arbeiðið um pensjónsnýskipanina nú veruliga fór at byrja. Um politiska arbeiðið hjá samgonguni nústani byrjar spyrji eg: Hví eru partar av pensjónsnýskipanini tá við í ólavsøkupakkanum?

**Tjóðveldi til reiðar**
Tjóðveldi gleðir seg til gott samstarv í arbeiðsbólkinum og okkara ynski eru sólarklár. Vit ynskja eina pensjónsskipan uttan sosialar ójavnar. Breiðastu herðarnar skulu hava minst í pensjón frá tí almenna og arbeiðsgevararnir skulu sjálvsagt vera við til at tryggja pensjónina hjá starvsfólkunum. Eisini heita vit á samgonguna - og vilja vera við í eyðsýnda neyðuga arbeiðinum - at gera eina smidliga skipan til tey menniskju, sum eru óarbeiðsfør, áðrenn vanliga pensjónsaldurin.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax  341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.